## Danmark hjálpir Maldivunum

Oyggjalandið Maldivurnar eru millum tey støð í heiminum, sum eru meinast rakt av veðurlagsbroytingunum. Kortini noyddist landið herfyri at senda avboð til altjóða veðurlagsráðstevnuna, sum verður í Keypmannahavn í desember. Orsøkin til avboðið var, at landið hevur ikki ráð at rinda ferðina til Danmarkar og uppihaldið í Keypmannahavn. Men nú fáa Maldivurnar hjálp. Danska stjórnin hevur gjørt av, at Maldivurnar skulu fáa part av teimum pengunum, sum er ætlaðir fátækum londum, so tey kunnu koma á ráðstevnuna.



## Bush var vónsvikin

Laura Bush, kona fyrrverandi amerikanska forsetan George W. Bush, avdúkar í einari samrøðu við CNN, at tað var eitt stórt vónbrot fyri mann hennara, at hann ikki megnaði at fáa republikanar og demokratar at arbeiða saman í Kongressini, tí tað hevði hann megnað, tá hann var guvernørur í Texas. Laura Bush heldur, at tað man eisini vera komið óvart á Barack Obama, forseta, hvussu torført tað er at fáa demokratar og republikanar at samstarva í Washington. Um eftirmælið hjá manni sínum sigur hon, at amerikanarar fara at minnast hann sum ein, ið vardi frælsi og trygd landsins.



*Kristina á Reynatúgvu, sum umframt at hava verið leiðari fyri barnaverndartænastuna í Sandoy, eisini er kona borgarstjóran í kommununi, hevur sagt seg úr starvi sum leiðari fyri barnaverndartænastuna*

# Kristina á Reynatúgvu sagt upp

**Leiðarin fyri barnaverndartænastuna í Sandoy segði seg í gjár úr starvi. Orsøkin er, at hon ikki kann liva við ivanum, sum er sáddur um starvssetan hennara og hennara viðurskifti við borgarstjóran, sum var við at seta hana**

UPPSØGN
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Í gjár segði Kristina á Reynatúgvu seg úr starvi sum leiðari fyri barnaverndartænastuna í Sandoy.

– Eg veit, at tað er mínar fakligu kvalifikatiónir, sum góvu mær starvið í barnaverndartænastuni í Sandoy, men eg kann, hvørki við mínum fakliga ella persónliga stoltleika liva við, at ivi verður sáddur um mína starvssetan, tí Páll á Reynatúgvu er maður mín, sigur Kristina á Reynatúgvu um uppsøgnina.

Hon leggur somuleiðis dent á, at hon hevur trivist í starvinum, og helt tað vera eitt gott og avbjóðandi starv.

### Maðurin fór frá

Mikið rumbul hevur annars verið í miðlunum um Páll á Reynatúgvu seinastu tíðina, og eitt av nýggjaru hendingunum í hesum rumbli var, at Brandur Sandoy og tríggir aðrir bygdarráðslimir heittu á borgarstjóran, Páll á Reynatúgvu, sum eisini er maður Kristinu á Reynatúgvu, at leggja frá sær.

Hetta endaði við, at Páll á Reynatúgvu legði frá sær, við teirri grundgeving, at hann ikki kundi liva við áhaldandi ágangunum á familju hansara.

- Kenni meg ikki sekan í teimum ákærum, sum eru settar móti mær, men kann ikki liva við, at familjan eg havi kær, ferð aftaná ferð, verður drigin gjøgnum fjølmiðlakvørnina saman við mínum politiska persóni. Vit orka snøgt sagt ikki meira, segði Páll á Reynatúgvu mánadagin.

Hendan ávirkan á familjuni hevur nú kravt enn meira.

### - Setti konuna

Tá Brandur Sandoy og hinir tríggir sendu brævið til Páll á Reynatúgvu at leggja frá sær, vóru ikki nógvar grundgevingar í brævinum, men sunnudagin greiddi Brandur Sandoy frá, hví hann skrivaði undir áheitanina til Páll á Reynatúgvu at leggja frá sær.

-Tá leiðari fyri barnaverndina skuldi setast, hevði borgarstjórin eftir mínum tykki eina sera óhepna hond við í spælinum, har hann sjálvur var við at taka avgerð um, at tað ikki skuldi søkjast av nýggjum eftir leiðara, eftir at tann sum fekk starvið tók seg aftur. Tað sum ger, at hetta er serliga óheppið, er at ivi kann seta um gegnið hjá borgarstjóranum við hesi avgerð, tí at henda avgerð bar við sær, at hansara egna kona fekk starvið ístaðin. Hetta er ein støða, har metast má, at borgarstjórin var betri farin við at biðja varamann sín koma í sítt stað, fyri at ongin ivi skuldi ráða um hansara gegni, var bert ein av grundgevingunum hjá Brandi Sandoy.

Alt hetta stríð hevur nú havt fleiri avleiðingar, enn teir sum skrivaðu undir brævið ætlaðu, tí boðaði Páll á Reynatúgvu frá, at hann leggur sær sum borgarstjóri, og nú hevur konan, Kristina á Reynatúgvu so eisini sagt seg úr starvi sum leiðari fyri barnaverndartænastuna í Sandoy.

# FAS skip møguliga bannað í ES-havnum

**- Við verandi gongd hjá føroyska flagginum er ikki óhugsandi, at skip, skrásett í FAS og sum hava verið afturhildin 3-4 ferðir seinastu 36 mánaðirnar, verða bannaði atgongd til ES-havnir frá 2011 at rokna, sigur Skipaeftirlitið**

FAS
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

27 lond, sum eru limir í “Port State” felagskapinum Paris MOU hava gjørt eina avtalu - The New Inspection Regime Project. Avtalan merkir, at skip, sum eru á hvíta lista, verða bert sýnað av Port State hvørjar 24-36 mánaðir. Hinvegin verða skip á svarta ella gráa lista sýnað minst sætta hvønn mánaða. Føroyska flaggið er í løtuni á gráa lista hjá Paris MOU, og tí koma øll FAS-skip beinanvegin at merkja eitt munandi strangari eftirlit í minsta lagi hálva hvørt ár.

Tað sigur Skipaeftirlitið í tíðindaskrivi.

- Síðan føroyska Skipaeftirlitið byrjaði, hevur visjónin verið, at føroyska flaggið skal koma á hvíta lista hjá Paris MOU. Gongdin hevur sum heild verið rætta vegin, men tó ikki nøktandi, sigur eftirlitið.

Lagt verður aftrat, at eftir 2011 fevnir Paris MOU-avtalan eisini um havnabann frá øllum havnum í tilsamans 27 londum, herímillum øllum ES havnum, fyri skip á svarta ella gráa lista, ið hava verið afturhildin 3-4 ferðir í einum tíðarskeið á 36 mánaðir.

- Paris MOU sigur seg hava fingið politiskan stuðul frá ES og hinum samstarvslondinum at áseta havnabann í nationalu lóggávuna hjá teimum einstøku londunum.

Skipaeftirlitið vísir á, at við verandi gongd hjá føroyska flagginum er ikki óhugsandi, at skip, skrásett í FAS og sum hava verið afturhildin 3-4 ferðir seinastu 36 mánaðirnar, verða bannaði atgongd til ES-havnir frá 2011 at rokna.

Sosialurin fer at venda aftur til hetta málið í blaðnum í vikuni.

Sosialurin
www.sosialurin.fo